Sosialurin


# Fá vilja leggja saman við Klaksvík



**«Stórur vandi er fyri at vit hvørva í teirri stóru kommununi«. Hetta tykist vera niðurstøðan hjá fleiri av smærru kommununum í Norðoyggjum**

ANALYSA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Norðoyggjar:** Tað verður hvørki sjálvboðið ella gleðiliga, at fýra av smærru kommununum vilja leggja saman við Klaksvík.

Hetta er greitt eftir eina spyrjirundu til borgarstjórarnar í Fugloy, Kunoy, Hvannasundi og Viðareiði.

Frá hesum kommunum verður greitt boðað frá, at tær ikki hava nakrar ætlanir um at leggja saman við ta størru.

Men tann stóri spurningurin er kortini, um tað í roynd og veru eru tær, ið sleppa at taka hesa avgerðina, ella um ikki landið sjálvt tekur hesa avgerðina fyri tær.

Bæði Veronika Petersen í Hvannasundi, John Damberg í Kunoy, Hans Jákup Kallsberg á Viðareiði og Zacharias Zachariassen í Fugloy eru ivasom til samanleggingar.

Ein spurningur í hesum sambandi er tann fíggjarligi. Tað verður ikki beinleiðis sagt, men tað skilst kortini, at onkrar av kommunum eiga nakað av peningi á bók. Og henda vilja tey sleppa at ráða yvir og brúka á heimstaðnum, áðrenn nøkur samanlegging kemur uppá tal.

*Eg havi skilt, at skulu tey (fólkið í Svínoy, blaðm.) skifta eina peru út í einum lyktapela, so mugu fólk úr Klaksvík út hagar at gera tað. Fyrr gjørdu tey tað sjálvi*
*(Zacharias Zachariassen, Fugloy)*

Felags fyri tey er kortini tað, at spurningurin um samanlegging er ikki beinleiðis viðgjørdur enn. Men hugsandi er, at tá til stykkis kemur, sleppa tey ikki at velja, men verða tvungin saman í eina stóra kommunu.

Ella sum Veronika Petersen tekur til: – Ein vil ráða sær sjálvum, so leingi sum gjørligt!

## Húsar: Tilgongd

Málið um at savna allar oyggjarnar norðanfyri í eina einstaka kommunu - um hon so kemur at eita Klaksvíkar kommuna, Norðoya kommuna ella okkurt heilt triðja – er aftur vorðið aktuelt.

Hesaferð var tað bygdaráðið í teirri lítlu Húsa kommunu, ið fevnir um bygdirnar Húsar og Syðradal á Kalsoynni, sum fekk málið fram aftur.

Á býráðsfundi í Klaksvík fyri viku síðani, var eitt uppskot til viðgerðar, har Húsa kommuna ynskir eina tilgongd sum skal enda við eini samanlegging við Klaksvík.

Býráðsfundurin í Klaksvík kom til ta niðurstøðu, at farast skal undir ein tilgongd við samanlegging millum báðar kommunurnar fyri eyga.

Men dentur varð samstundis lagdur á, at ein eigur ikki at skunda sær við hesum máli. Tí var eingin tíðarfreist ásett, nær tað endaliga skal verða avgreitt.

*Vit kunnu ikki taka støðu fyri ella ímóti nøkrum, fyrrenn vit vita, hvat vit skulu taka støðu til*
*(Hans Jákup Kallsberg, Viðareiði)*

Sum skilst hevur hetta málið verið til umrøðu í Húsa kommunu eitt tíðarskeið, men fyrst nú er líkt til, at verulig gongd er komin á tað.

Nevnast kann, at frammanundan eru hinar báðar bygdirnar í oynni – Mikladalur og Trøllanes – longu partur av Klaksvíkar kommunu.

## Hvannasund: Kortanei

Hetta við samanlegging er ikki eitt nýtt mál í Norðoyggjum.

Fleiri kommunur eru



*– Ein vil ráða sær sjálvum sum longst, sigur Veronika Petersen, borgarstjóri í Hvannasundi*